# Blákrossheimið

Ársroknskapur fyri 2017

## INNIHALDSYVIRLIT


| | SÍÐA |
|---|---|
| ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR | 2 |
| VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA | 3 |
| NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR | 4 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR FYRI 2017 | 5 |
| FÍGGJARSTØÐA | 7 |
| NOTUR | 9 |

## ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

Leiðari og nevnd hava í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin fyri 2017 fyri Blákrossheimið. Ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld við fíggjarárslok í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Nes, hin 5. mars 2018

Leiðari:

Olga Magnussen

Nevnd:

| | | |
|---|---|---|
| Álvur Højgaard<br>*formaður* | Hjalmar Hansen<br>*næstformaður* | Asta Marjunardóttir |

SPEKT | løggildir grannskoðarar

## ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til nevndina í Blákrossheiminum**

### Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Blákrossheiminum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2017 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rætta mynd í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, umframt val og nýtslu av einum hóskandi roknskaparhátti og útinning av roknskaparligum metingum, sum hóska til umstøðurnar.

Harumframt er tað ábyrgd leiðslunnar, at tær avgerðir, sum eru fevndar av ársroknskapinum, eru í tráð við givnu játtanina, lógir og aðrar reglugerðir og við gjørdar avtalur og vanliga siðvenju.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni og góðum almennum grannskoðanarsiði. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at Blákrossheimið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum hjá Blákrossheiminum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin fyri 2017 gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum hjá Blákrossheiminum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t. Tað er somuleiðis okkara fatan, at tað eru settar á stovn mannagongdir og innanhýsis eftirlit, sum stuðla undir, at tær avgerðir, sum eru fevndar av ársroknskapinum eru í tráð við givna játtan lógir og aðrar reguleringar og við gjørdar avtalur og vanliga siðvenju.

Tórshavn, hin 5. mars 2018
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Mirjam Haraldsen
*statsaut. revisor*

## NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR

Ársroknskapurin fyri Blákrossheimið er gjørdur eftir ásetingunum í "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

Ársroknskapurin er gjørdur eftir somu roknskaparreglum sum seinasta ár.

**Um innroknan og virðisáseting í ársroknskapinum**

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at stovnurin fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at stovnurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar. Útreiðslur nýttar til at rokka ársins inntøku verða tiknar við í rakstrarroknskapin.

## RAKSTRARJÁTTANIN

**Inntøka**

Almennur stuðul verður inntøkuførdur tað árið, hann er játtaður.

Aðrar inntøkur verða inntøkuførdar, tá rætturin til hesar er vunnin.

**Starvsfólkakostnaður**

Starvsfólkakostnaður fevnir um lønir, íroknað frítíðarløn og eftirlønir umframt aðrar kostnaðir til sosiala trygd v.m. til starvsfólk felagsins. Móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum eru drigin frá starvsfólkakostnaðinum.

**Kostnaður**

Kostnaður verður útreiðsluførdur í tí ári, hesin viðvíkur.

**Íløgur í útbúnað v.m.**

Íløgur í útbúnað verða útreiðslurførdar í tí ári, hesar viðvíkja.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum. Upphæddirnar eru metta hvør sær.

**Skuld**

Onnur skuld verður virðissett til áljóðandi virði.

## RAKSTRARROKNSKAPUR FYRI 2017

| | 2017 | 2016 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **Starvsfólkakostnaður** | | |
| Lønir | -4.148.056 | -3.681.967 |
| Endurgjald frá barsilsskipanini | 0 | 10.000 |
| Eftirlønir | -508.849 | -435.851 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | -178.187 | -157.523 |
| | -4.835.092 | -4.265.341 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | | |
| Ferðing og flutningur | -59.673 | -67.165 |
| Umboðan, matur og drykkjuvørur | -262.108 | -254.778 |
| Orkukeyp | -84.899 | -89.068 |
| Telefon og postgjøld | -53.975 | -36.950 |
| Bókhald, grannskoðan og roknskaparhjálp | -126.000 | -125.000 |
| Tryggingar | -17.184 | -20.153 |
| Skeið og konsulentgjald | -248.877 | -169.607 |
| Skrivstovuhald | -194.647 | -197.276 |
| Læknaútreiðslur og heilivágur | -192.000 | -192.000 |
| Bilrakstur | -5.599 | -3.973 |
| Keyp av vørum og tænastum annars | -159.117 | -133.023 |
| | -1.404.079 | -1.288.993 |
| **Keyp av útbúnaði** | | |
| Keyp av innbúgvi v.m. | -164.283 | -71.176 |
| | -164.283 | -71.176 |
| **Leiga og viðlíkahald** | | |
| Húsaleiga | -448.000 | -438.000 |
| Umvælingar og viðlíkahald, bygningur | -37.956 | -40.197 |
| Umvælingar og viðlíkahald, bilur | -4.058 | -25.938 |
| | -490.014 | -504.135 |
| **Kostnaðir til samans** | -6.893.468 | -6.129.645 |

## RAKSTRARROKNSKAPUR FYRI 2017

| | 2017 | 2016 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **Inntøkur** | | |
| Sola av vorum og tænastum | 44.385 | 106.365 |
| DAT - stuðulsjáttan smb. fíggjarlóg | 800.000 | 0 |
| DAT – meirnýtsla í mun til stuðulsjáttan, fíggjað av BKF | 89.388 | 0 |
| **Inntøkur til samans** | 933.773 | 106.365 |
| **Nettoútreiðslur, landskassin goldið** | -5.959.695 | -6.023.280 |
| **Rakstrarjáttan, Føroya Landsstýri** | 5.960.000 | 5.970.000 |
| **Meir-/minninýtsla í mun til játtan** | -305 | 53.280 |

## FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2017

| | 31/12 2017 kr. | 31/12 2016 kr. |
|---|---|---|
| **OGN** | | |
| **Ogn í umferð** | | |
| **Áogn** | | |
| Onnur áogn | 231.302 | 7.059 |
| **Áogn til samans** | 231.302 | 7.059 |
| **Tøkur peningur** | | |
| Kassi | 200 | 139 |
| EIK 185.133.2 | 7.718 | 22.434 |
| **Tøkur peningur** | 7.918 | 22.573 |
| **Ogn í umferð til samans** | 7.918 | 22.573 |
| **OGN TIL SAMANS** | 239.220 | 29.632 |

## FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2017

| Nota | | 31/12 2017 kr. | 31/12 2016 kr. |
|---|---|---|---|
| | **SKYLDUR** | | |
| | **Útjavningarkonto** | | |
| 1 | Útjavningarkonto | 214.523 | -40.363 |
| | **Eginogn til samans** | 214.523 | -40.363 |
| | **Skuld** | | |
| | **Stuttfreistað skuld** | | |
| | Onnur skuld | 24.697 | 69.995 |
| | **Skuld til samans** | 24.697 | 69.995 |
| | **SKYLDUR TIL SAMANS** | 239.220 | 29.632 |

## NOTUR TIL ÁRSFRÁSØGNINA

### 1 Útjavningarkonto

| | |
|---|---|
| Útjavningarkonta frá undanfarnum ári | -40.363 |
| Útreiðslur í árinum | -5.959.695 |
| Útgoldið í árinum | 6.214.581 |
| Útjavning við árslok | 214.523 |

### 2 Trygdarveitingar og eventualskyldur

Blákrossheimið hevur gjort eina leiguavtalu upp á 438 tkr. árliga. Avtalan kann sigast upp á báðum portum við 24 mánað freist.